## DAGSINS MEINING

# Studningsdupultmoralur

Vit vita av royndum í Føroyum, hvussu óheppið tað kann vera, tá landið letur rakstrarstuðul til vinnulívið. Rakstrarstuðul latin yvir ein kamb er skaðiligur, óansæð, um talan er um 8% endurgjald til skipasmíð ella talan er um kilostudning til flakavinnuna.

Man kann siga, at vit føroyingar vóru í rennuni aðru megin vegin, tá almennur studningur var regulin, heldur enn undantakið í føroyskari vinnu.

Hvussu er so nú? Fyriuttan at studningur framvegis verður latin, eitt nú til skipasmíð, so eru framvegis óbetalt lán við landskassaveðhaldi. Gamaní er hetta ikki so nógv, sum fyri 10 árum síðani, men til eru tey.

Sitandi samgonga ger nógv fyri at látast verða móti almennum stuðuli, men ikki er altíð so góður samanhangur millum orð og gerðir. Í undanfarna valskeiði var skuld hjá ávísum rækjubátum avskrivað, og var hetta gjørt fyri skattgjaldarans kostnað, uttan at landið, les skattgjaldarin, fekk nakað afturfyri, sum t.d. ávirkan ella partabrøv. Ein rein forering, ið Fólkaflokkurin stóð á odda fyri. At forera landskassans pening fyri einki er ikki rætt, men harvið er ikki sagt, at allur stuðul er av tí ringa.

Líka so skeivt, sum tað var konsekvent at lata stuðul til so at siga allar nýíløgur, sum støðan var fyri 20 árum síðani, líka so skeivt er tað, konsekvent at siga nei. Tað kunnu vera feløg ella ætlanir, ið hava so stóran týdning fyri samfelagið, at landið hevur ein egináhuga í framhaldi. Marknaðurin klárar ikki alt. Hvussu hevði t.d. verið við undirstøðukervinum, um marknaðarkreftirnar skuldu rátt út í odd og egg?

Føroyskir nýliberalistar hava lyndi til at siga nei til allan form fyri almennan stuðul yvir ein kamb. At landið t.d. setir partapening í feløg meta hesir verða skeivt. Er hetta skilagott? Støðan í dag, har man konsekvent sigur nei til almennan studning, merkir at vit eru farin úr rennuni aðru megin vegin, tá studningur var regulin heldur enn undantakið, í rennuna hinu megin vegin, har studningur konsekvent ikki verður latin. Vit eiga at minnast til, at um landið ikki slóðaði fyri við egnum pengum, so var neyvan nakar sjóvegis ferðafólkaflutningur á føroyskum hondum í dag.

Tað er ikki meiri enn nakrar vikur síðani týska stjórnin bjargaði einum mobiltelefonfelagi undan húsagangi. Amerikanska stjórnin, fyrimyndin hjá føroyskum liberalistum, bjargaði stóra bilframleiðarnum Chrysler fyri nøkrum árum síðani við einum láni, ið seinni var afturgoldið av Chrysler. Flogídnaðurin um allan heimin dúvar uppá statsveðhald eftir yvirgangsatsóknunum í fjør.

Tað er uppá tíðina, at man í Føroyum kann hava eitt fjøltáttað kjak um almennan leiklut, uttan at enda í einum svart hvítum kjaki um konsekvent ja ella konsekvent nei til studning. Eisini mugu allar studningsskipanir, ið verða nýttar í dag fram í ljósið. Einki er so ódámligt, sum politikarar og vinnulívsmenn, ið látast verða ímóti studningi, men fegin lata og taka ímóti í allari stillheit.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvat vil Sambandsflokkurin?

**Kristina Háfoss**
*Framsøgufólk Tjóðveldisfloksins í fíggjarmálum*



Ynskir Sambandsflokkurin at førdur verður ein varligur fíggjarpolitikkur, er neyðugt at hildið verður aftur við útreiðslunum. Ynskir Sambandsflokkurin ein sjálvberandi føroyskan búskap, er neyðugt at gera búskapin óheftan av danska ríkisstuðlinum. Men seinastu útsagnirnar frá Sambandsflokkinum bera hvørki brá av varligum fíggjarpolitikki ella einum ynski um sjálvberandi búskap - hvat vil Sambandsflokkurin ?

**Vil hava fleiri og færri rakstrarútreiðslur**
Næstformaður Sambandsfloksins - Alfred Olsen - gjørdi týsdagin í Útvarpi Føroya greitt, at rakstrarútreiðslur landsins vóru ov stórar. Samstundis segði hann, at tað var ein vanlukka at ríkisstuðulin varð skerdur, tí tørvur var á m.a. at nýta henda til at økja rakstrarútreiðslurnar.

**Fleiri íløgur - hóast búskaparstøðu og stórar íløgur**
Somuleiðis gjørdi næstformaðurin greitt, at tørvur var á fleiri íløgum - eitt nú á heilsu- og ellisøkinum. Hesi bæði økini verða raðfest sera ovarlaga á komandi fíggjarlóg, men hóast hetta, metir næstformaðurin, at vit skuldu nýtt ríkisstuðulin til at gjørt enn fleiri íløgur á hesum økjum. Hetta samstundis sum stórur mangul er uppá arbeiðsmegi í byggivinnuni og at íløgukarmurin er størri enn áður.

**Nýta blokkin og spara hann upp ísenn**
Men tað mest ótrúliga var, at samstundis sum tær 366 mió. kr., sambært næstformanninum, skuldu verið nýttar til øktar rakstrarútreiðslur og fleiri íløgur, ja, so skuldi tær samstundis setast til viks til verri tíðir.

**Kreativ bókføring neyðug**
Eisini hevur Sambandsflokkurin gjørt seg til talsmann fyri, at skerjingin í ríkisstuðulinum skuldi verið nýtt til framtíðar pensiónsskipan ella niðurgjalding av skuld, men ongin ivi er um, at Sambandflokkurin má nýta kreativa bókføring, um tær 366 mió. kr. skuldu verið nýttar bæði til uppsparing, pensiónsskipan, niðurgjalding av skuld, øktar rakstrarútreiðslur og fleiri íløgur v. m. Inntøkurnar á fíggjarlógini kunnu nevnliga bert nýtast einaferð um árið.

**Hvat vil Sambandsflokkurin ?**
Sambandsflokkurin hevur ferð eftir ferð gjørt greitt, at hann vil arbeiða til frama fyri varligum fíggjarpolitikki og einum sjálvberandi føroyskum búskapi. Hetta reisir nakrar áhugaverdar spurningar.

Skal ríkisstuðulin ikki miðvíst slúsast út úr føroyska samfelagsbúskapinum í bestu tíðum - nær skal hetta so henda ?

Metir Sambandsflokkurin at rætt er at økja rakstrarútreiðslur landsins meira enn tær 182 mió. kr. komandi ár (í mun til fíggjarlógina 2002) - serstakliga tá hugsað verður um, at rakstrarútreiðslur landsins eru øktar við um 800 mió. kr. seinastu 4 árini ?

Metir Sambandsflokkurin ikki, at hægri raðfesting av eldra-, serforsorgar-, heilsu-, útbúgvingar- og granskingarmálum á komandi fíggjarlóg eru rættar raðfestingar ?

Metir Sambandsflokkurin tað verða rætt at íløgur verða gjørdar fyri meira enn tær 260 mió. kr. frá almennari síðu - sjálvt um byggivinnan í Føroyum hevur stóran tørv á arbeiðsmegi og tað almenna harvið er við til at økja prís- og lønarstøðið óneyðugt ?

Hetta eru bert nakrir av teimum spurningum, ið kundu verið áhugaverdir at fingið svar uppá.

Tí møguligt er "ikki bæði at blása og at hava mjøl í munninum". Ynskir Sambandsflokkurin ein sjálvberandi búskap - eins og samgongan - er neyðugt hjá Sambandsflokkinum eitt nú at taka undir við, at gera føroyska búskapin alsamt meira óheftan av danska ríkisstuðlinum.

# Ávísar átrúnaðarligar skriftir

**Mourits Mohr Viderø**
*Tvøroyri*

Vónandi hava ikki øll, sum góvu sína undirskrift, lisið yvirlýsingina ígjøgnum, sum varð prentað í Sosialinum 21. sept. 2002.

Minni enn 1% av føroya fólki hava skrivað undir, at ávísar átrúnaðarligar skriftir – Bíblian – ikki skulu verða grundarlag undir landsins lógum. Skulu so restin av føroyingum, 99% góðtaka tað? Ikki eg.

Bíblian er grundarlagið undir øllum, sum fer fram í kirkjum og samkomum í Føroyum.

Eg eri vælvitandi um, at ikki allir føroyingar eru umvendir, frelstir, føddir av nýggjum, ella hvat nú Bíblian kallar tað at vera ein kristin. Men flest allir føroyingar, um teir ikki hava skrivað tað í bløðunum, ganga inn fyri at tann kristna læran er røtt og at Bíblian er Guðs orð.

Vit síggja á listanum av undirskriftum, at nógv kend nøvn eru ímillum, fyri tað mesta menta fólk. Verður ikki sagt at: Kristindómur er mentan?

Strangt tikið siga tit at tjóðsangur okkara – Tú alfagra land mítt – ikki heilt gongur eftir tykkara vild. Triðja vers tosar um frelsufrið, um andans dóp, ið gevur kraft til at bera merkið, sum eyðkennir verkið; Jesusar deyða á krossinum. Og hetta varðveitir Føroyar okkara land.

Ynskja tit ikki eisini tað? Alt bygt á Bíbliuna.

Gera vit landsins lógir ímóti Guðs orði, kann krossins merki/verki, ikki varðveita Føroyar okkara land. Guðs verju kunnu vit sum land og sum einstaklingar velja ella vraka.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Landsstýrismaður loypur frá gjørdum avtalum í fíggjarlógaruppskotinum

**Hergeir Nielsen**
*løgtingsmaður*



Tá økismennigarálitið var framlagt suðuri í Vági fyri 2 árum síðan, góvu allir flokkar á tingi lyftið um at stuðla ætlaða havnalagnum har.

Í mars mánaða í ár samtykti so eitt nærum samt løgting at gera havn í Vági. Hetta var efti tilmæli frá landsstýrismanninum í vinnumálum.

Í september mánaða samtykti aftur eitt samt løgting at játta pening til projektering av hesi somu havn í Vági – eisini eftir uppskoti frá sama landsstýrismanni.

Løgtingsins vilji kom til sjóndar í eini verklagslóg, sum landsstýrismaðurin hevði fyrireika av einslistum, og løgtingsins vilji kom aftur til sjóndar seinni, tá sami landsstýrismaður bað um játtan til projektering av sínum egna uppskoti.

**Eitt løgtingsval lá ímillum hesar báðar samtyktir. Allir flokkar hava í valstríðnum erpað sær av tí, og skuldi málið sostatt verið væl tryggjað.**

Í september mánaða skjóta tveir andstøðumenn upp at avtaka hesa somu løgtingslóg um Vágs havn. Teir halda ikki, at løgtingsins viljia, so sum hann var staðfestur ikki minni enn tvær ferðir av tveimum løgtingum, vera í nóg góðum hondum.

Fyribils úrslitið av hesi uppílegging í gjørdar semjur er, at landsstýrismaðurin er lopin frá sínum egna máli og hevur tikið tað av fíggjarlógaruppskotinum.

Fyri stuttum royndi hann at selja suðringum ein tunnil millum Øravík og Hov fyri 100 mió.kr.

Hesuferð skuldi hann koma í staðin fyri Vágs havn, sum kostar landskassanum 16 mió.kr.

Fyrru ferð ætlaði hann at selja suðringum Norrønu í staðin fyri nýggja Smyril, og tá skuldu teir fáa sama Øravík Hov - tunnil afturat Norrønu, um teir tóku av tí tilboðnum.

Tað ferðina støðgaðu vit landsstýrismanninum, og tað fara vit at gera hesuferð eisini, hvar bæði havnalag og tunnil eru sópaði av borðinum.

Andstøðumenninir hava gjørt málinum um Vágs havn óbótaligan skaða. Har vit aðrir hava gingið á naglinum á stórutá fyri at bjarga tí, og hava bjarga tí, royna teir at forkoma tí.

Teir koma á ting við einum málið, sum er samtykt ikki minni enn tvær ferðir, og billa tinginum inn, at tað sum tingið hevur gjørt, ikki er nóg gott.

Harafturat møtir annar teirra upp á tingi við fullfíggjaðari privatari kostnaðarmeting av einum almennum projektið og profilerar seg soleiðis, sum um hann eigur havnalagið sjálvur.

Samanrenning av privatum og almennum áhugamálum, og uppílegging í gjørdar og lógarfestar semjur, hevur so higartil verið nógmikið til, at landsstýrismaðurin er lopin frá síni ætlan við Vágs havn.

Aðrar verkætlanir í Suðuroy og kring landið annars liggja fyri framman, og eru hesar allar partur av eini langtíðarætlan, sum vit áløgdu okkum sjálvum at halda, um fíggjarlig ábyrgd annars skuldi ráða.

Nú túrurin er komin til Suðuroyar sleppa vit ikki teimum samtyktu málunum, tá spakin skal setast í tey. Gera vit tað, sleppa vit stavnhaldinum, og eingin fær nakað burturúr nøkrum.

Eftir einari viku hoyra vit úr Vági, at læknin er frásettur, uppboðssølan stongd, fjørðurin vrakaður og laksavirkið afturlatið.

Landsstýrismaðurin skal taka at sær, at hann sleppur ikki at leggja stein oman á byrðu við sínum persónliga stríði móti teimum virðisskapandi átøkunum so sum at kolldøma fjørðin og strika havnalagið.

**Tá hevur hann sett seg upp móti løgtingsins vilja, og tað fer at svíða sum svøllir.**

# Sambýlið í Smærugøtu einaferð enn

**Hvør hevur ábyrgdina, tá myndugleiki fremur mismun (diskriminering) móti fólki við menningartarni?**

**Torfinn Hentze**
*Vegna Javna*

Allir politisku flokkarnir skrivaðu grein í blaðnum Javni upp undir seinasta løgtingsval. Nógvar góðar hugsanir og ætlanir vóru lýstar í vøkrum orðum og festar á blað. Men nú, ið fólk við menningartarni renna seg í óvæntaðar trupulleikar, tá tey eru í ferð við at seta búgv í einum vanligum sethúsum í einum vanligum íbúarøki í landsins høvuðsstaði, hoyrist onki til hesar landspolitikararnar, hóast trupulleikarnir hava verið væl lýstir seinastu tíðina í teimum skrivaðu fjølmiðlunum, og hóast rættartrygdin hjá hesum minni mentu borgarunum nú er í váða.

Sum fólk flest vita so merkir rættartrygd, at øll fólk verða viðgjørd eins eftir almennum lógum og reglum.

Seinasta heyst, tá uppskotið til fíggjarlóg fyri árið í ár var framlagt, vísti tað seg at ongin játtan var í uppskoti til rakstur av nýggjum bústøðum til borgarar við menningartarni, hóast Serstovnadeildin undir Almannaráðnum hevði eina vælgrundaða umsókn um slíka játtan. Tað eydnaðist tó felagnum Javna við tógvi stríð, at fáa landsins myndugleikar til at viðganga tað órimiliga í at nokta hesi játtan, soleiðis at tá fíggjarlógin fyri árið í ár var endaliga samtykt á Føroya Løgtingi, var peningur játtaður til rakstur av nøkrum nýggjum bústøðum í sambýlum til fólk við brekinum menningartarni. Øll vóru glað og eisini sera takksom fyri, at hetta við bit og slit eydnaðist umsíðir.

Nú ið árið í ár fer at halla, vísir tað seg, at eini sethús í Smærugøtu í høvuðsstaði okkara Tórshavn, sum vóru keypt til sambýli hjá nøkrum fólkum við menningartarni, bert hava 2 fólk búgvandi í staðin fyri 5, sum annars ætlað, at rakstrarjáttanin á fíggjarlógini m.a. eisini skuldi nýtast til.

Orsøkin tykist óvanliga fløkt smb. tað innlit Javni hevur fingið í skjølini í sakini - men orsøkin er, at summir av borgarunum í grannalagnum hava klagað til Tórshavnar Kommunu. Fyrst var tað um, at hesi sethúsini í heila tikið skuldu brúkast til sambýli hjá fólki við menningartarni. Tey høvdu ta áskoðan, at nýtslan av sethúsunum stríddi ímóti byggisamtyktini fyri økið. Tey meintu eisini, at teirra egnu hús fóru at missa virði av nýggju menningartarnaðu grannunum. Og endiliga at hetta skapti ótryggleika fyri børn teirra. Hóast hesa klagu hava sethúsini verið nýtt til sambýli hjá hesum 2 fólkunum alt hetta árið.

Tíðliga í summar varð farið at tillaga innrættingina av sethúsunum, so at tey kundu "útnyttast" betri - soleiðis at 3 fólk afturat kundi búleikast har í sambýli.

Nakrir heilt fáir av somu grannunum klagaðu nú aftur til Tórshavnar Kommunu, hesuferð um at tillagingin av innrættingini í sethúsunum stríðir ímóti byggisamtyktini, sum krevur byggiloyvi í slíkum føri.

Tórshavnar Kommuna steðgar nú arbeiðinum við at tillaga innrættingina í sethúsunum og hóttir við fútaforboð, um ikki steðgað verður alt fyri eitt. Fyri at kunna halda fram krevur Tórshavnar Kommuna byggiloyvi.

Fyri frið skuld verður søkt um hetta byggiloyvið, men á fundi í byggi- og býarskipanarnevnd Tórshavnar Býráðs fyri á leið 14 døgum síðani, kom byggi- og býarskipanarnevndin til ta niðurstøðu, at sambýlið bert kundi fáa byggiloyvi til tillagingarnar av innrættingini treytað av, at sambýlið kundi fáa grannaváttan. Hetta vil sambýlið ikki av teirri einfaldu orsøk, at tað ongantíð fyrr, sovítt man hevur kunnað fingið uppspurgt, hevur verið kravt byggiloyvi til broytingar av innrættingini í vanligum sethúsum.

Eftir tí, sum avvarðandi býráðspolitikarir eftirfylgjandi hava úttalað og smb. tey skjøl í sakini, Javni hevur fingið innlit í, eru teir nú eisini farnir at ivast í, um hesi somu sethús í Smærugøtu kunnu verða nýtt til sambýli hjá fólki við menningartarni smb. byggisamtyktini. Soleiðis er nú hetta mál fløkt upp í ein ellibita.

Tað sum Javni nú vinarliga loyvir sær at spyrja avvarðandi landspolitisku myndugleikarnar um er:

1. Kann eitt bygda- ella býráð, hava eina byggisamtykt, sum kann tulkast tann vegin, at menningartarnaðir borgarar ikki fáa loyvi at búgva í vanligum sethúsum í einum vanligum sethúsaøki, tá hesi verða brúkt sum sambýli?
2. Kann eitt eigarafelag ella nakar annar gera reglar, sum kunnu tulkast soleiðis, at teir útihýsa menningartarnaðum borgarum at seta búgv í sambýlum í vanligum sethúsaøki?
3. Kann eitt bygda- ella býráð praktisera byggireglar og seta krøv um byggiloyvi á ein strangari hátt í teimum sethúsunum, har menningartarnaði fólk búgva, enn í teimum sethúsunum, har "vanlig" fólk búgva?
4. Um svarið er ja uppá nakran av hesum trimum spurningunum, er so ikki talan um mismun (diskriminering)? Og brot á grundleggjandi mannarættindi?
5. Um talan er um mismun í nøkrum av hesum førum, hvør myndugleiki hevur so evstu ábyrgdina av at verja hesi fólk móti slíkum mismuni? Og endiliga - hvat ætlar hesin myndugleiki í so fall at gera fyri at forða fyri, at slíkur mismunur nakrantíð kann verða framdur aftur?

Hóast Javni ikki er beinleiðis partur í hesum málinum, so umboða vit tey fólk, sum bera brekið menningartarn, t.v.s. teir av okkara borgarum, sum eru allarveikast og ikki kunnu svara fyri seg sjálvan.

Javni metir hetta sum eitt sera grundleggjandi ("prinsipielt") mál, eftirsum tað snýr seg um rættartrygdina hjá hesum okkara veikastu borgarum. Og - einaferð afturat - rættartrygd merkir jú, at man viðgerð øll fólk eins eftir almennum lógum og reglum. Og ikki ger mismun, soleiðis sum Tórshavnar Býráð eftir okkara bestu sannføring hevur gjørt í hesum málinum.

Vónandi fáa vit rætta viðkomandi at svara øllum hesum 5 spurningunum alment sum skjótast, soleiðis at vit og øll onnur greitt fáa at vita, hvar fólk við menningartarni eru í okkara rættarskipan.

## Veraldar dansur

*Dagur dettur av degi*
*Hin bleiki skuggi mín uggi*
*Heystarvindar blása um hól*
*Summardagur komin og farin*
*Brátt fýkur fúna leyv í garði.*

*Veraldar dansur tykist so menskur*
*Tó skjótt troyttast mannabarn*
*Har manndómur treystliga steig*
*Styðjar oldingin seg við jarðarvegg*
*Deyðakvæðið menskast í kvirruni.*

*Tú eg og øll hini í verð*
*Brátt komin og farin um sýn*
*Dansurin úr jarðarglitur heldur fram*
*Fýkur eins og fon í jarðarvindum.*

**Rituvík: Eyðálvur Kári Nielsen**